

## Ingibjörg heiðurslimur

Seinasta fríggjakvøld var íslendski uttanríkisráðharrin, Ingibjörg Sólrún Gísladóttir, boðin at halda røðu í amerikanska kvinnufelagsskapinum Women's Foreign Policy Group í Washington, og í tí sambandi bleiv hon samstundis tilnevnd heiðurslimur í felagsskapinum. Aftan á røðuna fekk Ingibjörg Sólrún Gísladóttir nógvar spuerningar, og millum annað vildu tær amerikonsku kvinnurnar hoyra søguna hjá íslendska Kvinnulistanum.

## Byggiætlan fingið skap

Í síðstu viku vórðu útveggirnir reistir í húsa- og íbúðarbyggingini, sum felagið Sundahús hjá Jóan Peturi Vang er farið undir tætt við skúlan og dagstovnin á Flatinum á Oyrarbakka. Byggingin umfatar tvíhús og íbúðir í ymsum støddum. Í mun til upprunaligu ætlanina er byggingin eitt sindur seinkað, men fyrsta byggistigið verður innilokað fyri jól, og klárt verður at flyta inn til várs, skrivar Sunda kommuna á heimsíðuni.

# Borur settur í Williambrunn í nátt



*So hevur Transocean Rather sett borin í á Williamleiðini, sum er sætti brunnur á føroyskum øki*

*Savnsmynd*



*Í 2001 vóru tey í BP vónbrotin av boriúrslitinum á føroyska landsgrunninum. Hesaferð eru útlitini verri, og tí eru vónirnar ikki tær somu, sigur stjórin í BP í Føroyum, Hjarnar Djurhuus*

*Savnsmynd*

**Klokkan 01 í nátt setti BP borin í á Williamleiðini. Sostatt er sætta boringin á føroyska landsgrunninum veruleiki**

FRÁLANDAVINNA

*Jan Müller*

*Kári Mikkelsen*

So hendi tað endiliga. Samtakið millum BP, Shell og Anadarko hevur nú sett borin í á William-leiðini, og harvið er sætti brunnurin á føroyska landgrunninum farin í gongd.

Mánanáttina 22. oktober klokkan 01 setti Transocean Rather borin í undirgrundina á Williamleiðini har suðuri á landgrunninum.

Hetta er eitt sindur seinni enn upprunaliga ætlað, men tað ganga altíð nakrir dagar við at fyrireika, upplýsir Hjarnar Djurhuss, stjóri á BP í Føroyum.

Tað stóra arbeiðið er at fáa akkerini, sum eru átta í tali, at liggja sum tey skulu.

– Veðrið hevur darvað onkrar dagar, men annars hevur gingið nøkunlunda eftir ætlan. Nú vóna vit, at alt fer at ganga væl sigur føroyski stjórin hjá BP.

Hann hevur saman við mongum øðrum nú í fleiri ár bíðað við stórum spenningi eftir hesi løtu. Fyrst gekk long tíð at fáa flutt brunnin til eitt nýtt øki á landgrunninum, og síðani hevur tað eisini tikið nógva tíð at bíða eftir boripallinum. Eina løtu sá tað heldur svart út og røddir vórðu frammi um, at boringin fór helst at verða útsett til næsta ár, vegna vánaligt veður. Men tað skuldi kortini vísa seg at bera til.

Hjarnar Djurhuus vísir á, at síðani vanlukkuna við norska veitingarskipinum, Bourbon Dolphin, sum koppaði í vetur, og fleiri mans druknaðu, tá akker skuldu leggjast við ein brunn á Rose Bank-leiðini á enskum øki, so er oljufeløgini eyka varin í sambandi við at leggja boripallar.

– Tað hevur tikið eina góða viku at fáa alt uppá pláss, og sjálvt um veðrið hevur tarnað nakað, er týdningarmikið at koma væl frá byrjan. Tí hava tey umborð á hesum risastóra boripallinum ikki tikið nøkur óráð fyri. Alt er fyrireikað og samskipað til minstu detalju. Hóast sannlíkið fyri at gera eitt veruligt oljufund er kanska ikki meira enn 15 prosent sambart BP stjóranum Jonathon Trueman í samrøðu við Rás 2 fríggjadagin, so er serstakur rómur og spenningur nettupp rundan um hesa boriverkætlanina.

### Tekur 3-4 mánaðir

At tvey av heimsins størstu oljufeløgum standa fyri henni og tey feløgini, sum eru mest virkin á Atlantsmótinum við framleiðslum vestan fyri Hetland, sigur ikki so lítið. Hetta er so eisini aðru ferð at borað verður gjøgnum basaltið, so við royndunum frá tí fyrsta bas altbrunninum, Brugduni hjá Statoil í fjør, verður tað kanska hesaferð møguligt at avdúka, hvat veruliga goymir seg undir basaltinum.

Mett verður, at tað kann taka upp til 3-4 mánaðir at bora brunnin, men gongst heilt væl, so verður komið á mál kanska eftir hálvan triðja mánað. Hetta merki, at eitt úrslit av boringini verður kanska tøkt um ta tíðina, tá føroyingar fara at velja eitt nýtt løgting, miðskeiðis í januar mánað 2008.

Sjálvur brunnurin er mettur at kosta millum 350 og 400 mió. krónur. BP eigur 50 prosent av boriverkætlanini, meðan Shell og Anadarko eiga 25 prosent hvør.

– Um brunnurin gevur lítið og einki, melda vit tað rímuliga greitt út. Skuldi nakað verið, so verða vit eitt sindur meiri afturhaldnir við kunningini, sigur Hjarnar Djurhuus.

Spurdur um hetta merkir, at jú minni teir siga, jú ljósari sær út, sigur stjórin hjá BP í Føroyum flennandi, at tað kann mann gott siga.

# 800 fólk til konsert

**Skála:** Leygarkvøldið endaði árliga sangskeiðið hjá Heimamissiónini við eini stórari konsert í ítróttarhøllini á Skála

Alla vikuna høvdu teir 130 sangfuglarnir vant fleiri sangir ígjøgnum á skeiðnum, sum varð hildið í Leguhúsinum í Nesvík.

Hetta kvøldið var so sjálvur endabresturin við stórari konsert, har eini 800 fólk lýddu á. Veðrið var ikki tað besta uttandura, men hetta forðaði kortini ikki fólki í at koma til konsertina.

Konsertin byrjaði við barnakórinum, sum hevði einar 30 sangarar, og endaði við tí stóra kórinum sum taldi omanfyri 80 sangfuglar.

Áhoyrararnir tóktust hugna sær í høllini, og líkt var til at teimum dámdu sangirnar so mikið væl, at kórið varð klappað til eitt eykalag.

Kórleiðari var danska Maud Kofod, sum dagliga stjórnar gospelkórinum Vocation, sum hevur heimstað í Keypmannahavn.

**sb.**



*Stóra felagskórið sang fleiri sangir og varð enntá klappað til at syngja eitt eykalag*

*Mynd: trubodin.fo*